# Veðrið

**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av eystri ella av ymsum ættum og regn av og á. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og yvirhvøur turt. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri og regn. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið leygardagin og Hvítusunnudag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og suðri og ælingur. men eisini sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.

# Kamikaze-likka í Vestmanna



HØGNI MOHR

Myndamaður og blaðmenn í bygdabilinum komu hendan dagin fram á eina deyða likku í Vestmanna. Likkan lá við veingjunum fyri eyguni. Greitt er ikki, nær hon lat lív.

Vit ringdu til alt fyri eitt til borgarstjóran í Vestmanna, Gunn Joensen, at frætta, um støðan í Vestmanna er so vánalig, at likkurnar ikki tora at líta niður á annars hugtakandi húsalonirnar í bygdini:

*Halló, hetta er Sosialurin. Vit hava funnið eitt likkulík í Vestmanna!*

– Ná, ja...

*Hvussu ber tað til, at hon lá við veingjunum fyri eyguni? Tað sá út, sum var hon fallin, tí hon hevði sæð okkurt óhugnaligt!*

– Hahaha…ja, tað voyst tú…aha…

*Er støðan í Vestmanna so vánalig, at likkurnar ikki megna at halda sær á flogi yvir bygdini?*

– Ja, okkurt sóvritt man tað vera...

*Men gongur alt ikki betur síðani kvinnurnar tóku valdið í bygdini?*

– Vit tóku ikki ræðið; vit blandaðu okkum upp í. Nei, álvara, eg havi onga fokláring upp á tað við likkuni.



*Gunn Joensen, borgarstjóri í Vestmanna, setir løgna likkudeyðan í størri høpi.*
***Mynd: Jens Kristian Vang***



*Við vongunum fyri eyguni lá hendan likkan steindeyð í Vestmanna.*
***Mynd: Jens Kristian Vang***

Slettis ikki. Tær, sum halda til uttanfyri hjá mær, halda bestemt ikki veingirnar fyri eyguni.

*Kann orsøkin til likkufallið vera ein onnur, meðni?*

- Hon man hava rent í ein lyktapela, gangi eg út frá. Nei, álvara, hvat vilt tú...

*Eg vildi bara uppklára gátuna um ta deyðu likkuna!*

– Hevur tú bílæt av henni..?

*Ja!*

– Hihihi…hattar virkar heilt burturvið...

*Kann hon hava flogið somikið høgt, at hon er fallin av at síggja onkra aðra bygd?*

– Noy, nú voyt Pól ikki...

*Eru likkur ikki dotnar niður í Vestmanna áður?*

– Ikki upp á handan mátan, noy. Ikki líkasum gjørt sjálvmorð upp á handan mátan...

*Eru likkur í Vestmanna?*

– Ja.

*Vestmanna er altso ikki staðið, har likkurnar venda?*

– Nei. Tú álvara, eg trúgvi tær altso ikki. Tú hevur ikki lagt hana soleiðis sjálvur, ha...?

*Kann onkur avbygdarmaður hava lagt hana soleiðis fyri at spæla tykkum eitt puss?*

– Nei, eg dugi ikki at fyristilla mær, hví nakar skuldi gjørt tað. Eg skilji tað ikki. Tá ið tær eru dotnar niður plagdu tær at liggja splattaðar; ikki við veingjunum fyri eyguni...

*So tú veitst onga beinleiðis orsøk til, at hon helt fyri eyguni?*

– Noy, hahaha. Men skriva ikki, at tit funnu hana í Vestmanna (hoho...).

*Men hin teoriin um, at likkan hevur verið langt uppi, og tískil hevur sæð eitt størri øki. Er hon ikki brúkilig?*

– Jú, tað kundi verið. Kanska tað vísir, at alt landið er við at fara út av eggini…




Lágtrýstið eystanfyri Hvarvið stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum í morgin.




Lágtrýstið vestanfyri Írland kemur móti Føroyum og dýpist nakað.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 13 |
| Nuuk | 1 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 13 |
| Tromsø | 7 |
| Bergen | 14 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 14 |
| Keypmannahavn | 14 |
| Helsinki | 14 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 20 |
| Warzawa | 27 |
| Kiev | 26 |
| Bukarest | 30 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 23 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 27 |
| Athen | 31 |
| Malta | 27 |
| Tunis | 31 |
| Beijing | 34 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 14 |
| New York | 17 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | – |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 20 |




**Hitalagið mált frá 05./06. kl 06$^{00}$–06./06. kl 06$^{00}$. Hitin í gjár: 8,0°C**
Minsti hiti máldur í juni: **0,0°** Mesti hiti máldur í juni: **20,0°**




Avfallið: 0,0 mm – **mált frá 05./06. kl 6$^{00}$–06./06. kl 06$^{00}$**
Avfallið higartil í juni: 0,2 mm

## Vestfalskyrrindi

2. juni: Tendring
3. juni: Mánin næstur jørðini
9. juni: Fyrra kvarter

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. juni | 10.51 | 23.17 | 9.51 | 22.17 | 10.06 | 22.32 | 0.25 | 12.51 | 1.25 | 13.51 | 9.06 | 21.32 | 8.06 | 20.32 | 11.06 | 23.32 | – | 12.06 | 10.36 | 23.02 | 11.51 | – |
| 8. juni | 11.47 | – | 10.47 | 23.16 | 11.02 | 23.31 | 1.17 | 13.47 | 2.17 | 14.47 | 10.02 | 22.31 | 9.02 | 21.31 | – | 12.02 | 0.32 | 13.02 | 11.32 | – | 0.17 | 12.47 |
| 9. juni | 0.16 | 12.52 | 11.52 | – | – | 12.07 | 2.16 | 14.52 | 3.16 | 15.52 | 11.07 | 23.43 | 10.07 | 22.43 | 0.31 | 13.07 | 1.31 | 14.07 | 0.01 | 12.37 | 1.16 | 13.52 |
| 10. juni | 1.28 | 14.05 | 0.28 | 13.05 | 0.43 | 13.20 | 3.28 | 16.05 | 4.28 | 17.05 | – | 12.20 | 11.20 | 23.57 | 1.43 | 14.20 | 2.43 | 15.20 | 1.13 | 13.50 | 2.28 | 15.05 |

Kelda: Skipalistin 2000